# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

*Eftir at hava lisið og hoyrt so nógv um oljuleiting, føldi eg tað soleiðis, at nú mundi tað fara at eydnast hjá okkum at finna oljuna*

*Sverri Mortensen, Argir*



*Sverre Mortensen á einum av gongutúrum síðani sunnan fyri heimbygdina - við heldur óvanliga gestinum undir Argjalandinum*
*Mynd Jan Müller*

84 ára gamli Sverre Mortensen:

# Kenni á mær at nú finna vit oljuna

**Hann er bert ein av mongum, sum í hesi løtu bíðar í stórum spenningi eftir úrslitinum av boringini umborð á Stena Don á føroyska landgrunninum**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hann er ein av teimum føroyingum, sum í løtuni bíðar í stórum spenningi eftir úrslitinum av boringini umborð á pallinum Stena Don 80 fjórðingar frá heimbygdini Argjum. Sverre Mortensen, sum í dag er 84 ára gamal, telist eisini millum teirra, sum vónar, at vit hesaferð raka við oljuna.

Fyri góðum mánaði síðani var Sverre Mortensen vitni til heldur óvanliga sjón, tá hann koyrdi køksgardinurnar frá. Ístaðin fyri at síggja ein flota av gráum russiskum trolarum á Nólsoyarfirði henda morgunin, var eitt púra reyðlitt fremmant far, fullkomiliga øðrvísi í skapi og støð undir Argjalandinum enn útlendsku trolararnir, nevniliga einki minni enn ein risa oljuboripallur.

Fyri Sverra var hetta ikki nøkur ræðandi sjón, tvørturímóti kendi hann hesi sjón sum boð uppá eina ljósari framtíð. Vit lata Sverra sjálvan greiða frá teimum tonkum og kenslum hann upplivdi henda morgun, tá Stena Don stillisliga „ankraði“ stutt frá Argjalandinum.

– Eg hugsaði, at tað var sera spennandi at hava henda sjáldsama gestin, boripallin heilt inni undir Argjalandinum. Eftir at hava lisið og hoyrt so nógv um oljuleiting, føldi eg tað soleiðis, at nú mundi tað fara at eydnast hjá okkum at finna oljuna.

Nú eru eru so meira enn fimm vikur síðani, at sjáldsami og óvanligi gesturin undir Argjalandinum setti kósina út á landgrunnin. Og har hevur hann verið síðani. Sverre er bert ein teirra, sum bíðar við stórum spenningi eftir tíðindunum um boringina.

## Kærkomin

Sjálvur heldur Sverre, at ein oljuvinna er kærkomin fyri land og fólk, men hann sigur, at vit mugu gera okkum púra greitt, at hetta fer at hava við sær, at nógv fremmandafólk fara at koma til Føroya, og tað kann so vera bæði uppá gott og ilt, tí soleiðis háttar heimurin seg einaferð. -Vit mugu bara vóna, at ein oljuvinna fer at lætta um byrðarnar hjá okkum borgarum.

Hóast høga aldurin hevur Sverre góða heilsu og kemur einki hóttafall á seg sær hann fram til at uppliva, at oljan kemur upp úr undirgrundini. Abbi hansara bleiv 96 ár, so Sverre setir sítt álit á, at eisini hann fer at røkka ein nóg høgan aldur til m.a. at uppliva einar Føroyar við oljuríkidømi.



*Stena Don á Nólsoyarfirði í juli, áðrenn kósin var sett út á landgrunnin.*
*Mynd Jan Müller*



*- Eg kenni á mær, at hesaferð raka vit við oljuna sigur 84 ára gamli argjamaðurin Sverre Mortensen*
*Mynd Jan Müller*